Starvsmannafelagið í øðini um hóttan frá Tryggingini:

Vil siga øllum upp



Jákup Danielsen, formaðurin í Starvsmannafelagnum er alt annað enn fegin um hóttanina frá tryggingini. Mynd: Kalmar

-um Tryggingarsambandið ikki fær nýggjan sáttmála nú beinanvegin. Hetta er tað einasta, ein arbeiðsgevari ikki kann loyva sær at siga, heldur formaðurin í Starvsmannafelagnum

Starvsmannafelagið er ikki liðugt at samráðast um nýggjar sáttmálar á hesum sinni. Sáttmálin, sum fevnir um nógv teir flestu limirnar, er undirskrivaður, men enn er onkur eftir. Millum annað hann við Tryggingarsambandið Føroyar.

Jákup Danielsen, formaður í Starvsmannafelagnum sigur, at partarnir hava samráðst í tveir dagar, og eingin hevur tosað um annað enn, at lønin skal niður, eins og úrslitið varð við sáttmálanum við landsstýrið.

Tó er tann munur, at viðvíkjandi tryggingini ber illa til at nema við eftirlønarskipanina, sum gjørt var í avtaluni við landsstýrið. Semja er um at lønin kann lækka 4,5 prosent, men hvussu hini fýra prosentini skulu skerjast, er enn ikki greitt. Í avtaluni við landsstýrið vóru hesi fýra prosentini skerd í eftirlønarskipanini, og tað gjørdi, at starvsfólkini ikki merktu so nógv til skerjingina her og nú.

Jákup Danielsen sigur, at skulu starvsfólkini á Tryggingarsambandinum skerjast eins nógv og tey hjá tí almenna, missa tey á tryggingini umleið 1300 krónur um mánaðan í mun til helmingin, sum tey undir landinum mistu í tøkum pengum, og tað heldur hann vera óheppið.

At tey, sum arbeiða á tryggingini nú fara niður í løn, er annars ikki meira enn natúrligt, tí tryggingin er von at fylgja við, tá lønin gongur uppeftir, sigur Starvsmannafelagsformaðurin.

Grov hóttan

Men tað er av heilt øðrum orsøkum, at formaðurin í Starvsmannafelagnum er í øðini inn á leiðsluna á tryggingini.

-Vit fingu mánadagin at vita, at fekk Tryggingarsambandið ikki nýggjan sáttmála við Starvsmannafelagið nú beinanvegin, hendi tað, at tryggingin fór at siga øllum teimum 130 starvsfólkunum upp. Tá hevði tryggingin staðið fríðari í summar, tá nýggjur sáttmáli skuldi gerast, og tá vildi tryggingin eisini hava møguleika til, at starvsfólkini fóru í annað fakfelag, sigur Jákup Danielsen, og tað heldur hann vera nógv fyri.


-Hetta er tað einasta, ein arbeiðsgevari ikki kann loyva sær at siga, sigur formaður í Starvsmannafelagnum, sum vísir á grein níggju í funktionerlógini sum sigiur, at tað er upp til starvsfólkini at gera av, hvussu tey vilja organisera seg.

Fund við starvsfólk

Í skrivandi stund er ógreitt hvat fer at henda við starvsfólkunum á tryggingini. Starvsmannafelagið beyð teimum til fundar í gjár seinrapartin fyri at fáa at vita, hvat tey høvdu at siga til ein nýggjan sáttmála, og hvussu hesin skal síggja út.

-Vit vóna, at vit fáa eina semju sum allir partar kunnu liva við, men tílíkar hóttanir, sum hana frá tryggingini hesaferð, eru vit ikki fegin um, sigur Jákup Danielsen.

tór.-



✲ Bókhald/MVG
✲ Grannskoðan
✲ Roknskapur
✲ Incasso
✲ Ráðgeving

P/f
Roknskaparstovan
v/ Terja Dalsgaard
Tlf. 61376 - Fax 61309
FR-210 Sandi

»KINGFISHER« & »ISLANDER« ÚTRÓÐRARBÁTAR
– álitið til útróðurs hjá bretskum útoyggjamonnum



»KINGFISHER 33«. Longd 9,8 m, breidd 3,9 m, dýpi/stingur 1,5 m. arb.dekk heilar 24 kvm., tangi 350 gallons/500 fjórðingar. Motorur 100–220 hestar

15–33 fót	4,6–10,0 m
ISLANDER 15, 16 og 19 fót	4,6–5,8 m
ISLANDER 23 og 26 fót (Skjóttgangandi útróðrar- og vinnubátar)	7,0–8,0 m
KINGFISHER 20, 26 og 33 fót (tyngri, sjótryggari útróðrarfør)	6,1–10,0 m

Bátarnir kunnu latast heilt lidnir og útgjørdir – ella á tí byggistigi, kundin ynskir.

Vit kunnu eisini útvega brúktar bátar og alla sjóvinnuútgerð – mek./tekn. ella aðra til størri sum smærri før.

Vinnu- ella frítíðarfør – spyrjið so fyrst hjá okkum!

SM Services
SMITHY HOUSE Telephone 009 44 (0569) 64706
STONEHAVEN AB3 2 NH Fax 009 44(0569) 66589
Scotland UK
Skrivið ella ringið og biðið um Alan Johnston

- sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialuri

JA Eg gerist haldari av Tíðindablaðnum Sosialinum og fái blaðið 5 ferðir um vikuna.
fyri 225 kr./ársfj. (haldarar í Føroyum)
fyri 260 kr./ársfj. (haldarar í Skandinavia)

Goldið verður bert fyri bløðini restina av hesum ársfjórðinginum.

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Bygd/býur: ______________________

Kannað postverkinum

Ókeypis Sosialurin rindar postgjaldið
64

Tíðindablaðið sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin - sosialurin